BARNAVERKÆTLANIN

EITT TVØRGEIRAÐ SAMSTARV MILLUM LAND OG KOMMUNUR

BÓKLINGUR

Samandráttur av
uppskoti til barnalóg

Lesaravegleiðing

Hesin bóklingurin er ein samandráttur og forklaring av uppskotinum til barnalóg.

Hann er ætlaður at geva einum breiðum lesaraskara innlit í, hvat lógin snýr seg um, hví hon verður løgd fram, og hvussu hon er ætlað at virka í praksis.

Bóklingurin lýsir høvuðsprinsipp, skyldur og skipanir í barnalógini, men er ikki lógartekstur. Hann hevur tí ikki sjálvstøðugt lógarvirði og kann ikki nýtast sum grundarlag fyri einstakar avgerðir.

Tá bóklingurin verður lisin, er týdningarmikið at skilja mun á:

- skyldum, sum almennir myndugleikar eru bundnir av sambært lógini,
- kørmum, sum lógin setir fyri samstarv og samskipan
- og arbeiðsháttum, sum vísa, hvussu hjálp er ætlað at verða skipað í praksis.

Hví fáa vit eina barnalóg?

Føroyar skulu vera tað besta staðið í heiminum hjá øllum børnum og ungum at vaksa upp í. Barnalógin er eitt týðandi stig mótvegis hesi visjón.

Barnalógin hevur til endamáls at tryggja, at øll børn og ung í Føroyum hava góðar karmar fyri trivnaði, fáa rættstundis hjálp, og verða hoyrd og tikin í álvara í málum, sum viðkoma teimum.

Nógv bendir á, at alt ov nógv børn og ung í Føroyum ikki fáa hjálp nóg tíðliga, ella at hjálpin, tey fáa, er ov illa samskipað.

Í dag eru tænastur og ábyrgdir býttar millum fleiri stovnar og myndugleikar, bæði hjá landi og kommunum, og samstarvið er ikki altíð bindandi. Hetta førir við sær, at summi mál detta niður ímillum skipanir.

Barnalógin skal bøta um hetta við at skapa ein felags karm og bindandi leist fyri, hvussu almennir myndugleikar, skipanir og stovnar skulu samstarva og samskipa hjálp og tænastur til børn, ung og familjur teirra.

Rættstundis hjálp

Børn og ung skulu fáa hjálp, tá teimum tørva tað – tey skulu ikki bíða ov leingi.

Barnalógin leggur dent á, at børn og ung skulu hava góðar umstøður fyri trivnaði og heilsu, eisini tá eingir greiðir trupulleikar eru staðfestir. Arbeiðið skal taka støði í at skapa tryggar og stuðlandi karmar í gerandisdegnum.

Tá avbjóðingar taka seg upp, skal hjálp setast inn tíðliga, áðrenn trupulleikarnir gerast størri.

Hjálpin er ikki avmarkað til børn og ung við sjúku ella diagnosu, men fevnir eisini um onnur viðurskifti, har stuðul er neyðugur.

Myndugleikar skulu taka støði í tørvinum hjá tí einstaka barninum og meta, hvat skal til, fyri at barnið kann trívast.

Kommunur og land hava skyldu at tryggja, at børn og ung fáa rættstundis og góða hjálp.

Barnalógin skal føra við sær, at arbeitt verður við:

- **Trivnaði og heilsufremjan:** Lógin skal stuðla undir, at øll børn og ung trívast og hava góða heilsu. Hetta fevnir um eitt breitt arbeiði, sum hevur til endamáls at skapa góðar og tryggar karmar fyri øll børn og ung.
- **Fyribyrging:** Lógin skal gera tað møguligt at seta hjálp inn tíðliga, so trupulleikar ikki gerast størri. Her er dentur lagdur á at lofta teimum børnum og ungum, sum eru í vanda fyri at fáa avbjóðingar.
- **Rættstundis hjálp:** Børn og ung, sum hava tørv á hjálp, ella eina samskipað tænastu, skulu fáa hana, tá tørvurin er staðfestur.

Ein meginregla í barnalógini er, at alt, sum verður gjørt sambært lógini, skal vera til barnsins besta.

KAP. 1

Virkisøki og rættindi barnanna



Barnalógin er ein lóg fyri øll børn og ung í Føroyum.

Barnalógin fevnir um:

- øll børn og ung í Føroyum frá tey eru fødd og til tey fylla 18 ár (hjálpin kann halda fram eftir 18 ár við samtykki frá tí unga),
- foreldur og onnur í foreldranna stað,
- og komandi foreldur, soleiðis at hjálp kann setast inn longu áðrenn barnið verður føtt.

Lógin er galdandi fyri øll børn og ung, sum búgva ella eru stødd í Føroyum, uttan mun til ríkisborgaraskap.

KAP. 1

Virkisøki og rættindi barnanna

Øll børn og ung hava rætt til at verða hoyrd í málum, sum viðkoma teimum.

Myndugleikar hava skyldu at tryggja, at áskoðan barnsins verður fingin til vega beinleiðis í talu við barnið, í tann mun hetta er møguligt og hóskandi í mun til aldur og búning.

Hoyringin skal vera ein leypandi partur av málsviðgerðini, og barnið skal takast við allan vegin, ikki bert hoyrast einaferð. Sjónarmið barnsins skulu takast við og nýtast sum partur av grundarlagnum undir avgerðum.

Endaliga ábyrgdin fyri avgerðum liggur framvegis hjá teimum vaksnu og myndugleikunum.

Um barnið, orsakað av alduri, menning, breki ella øðrum viðurskiftum, ikki megnar at seta orð á sína áskoðan, hava myndugleikar skyldu at tryggja, at áskoðan barnsins verður fingin til vegar á annan hátt, til dømis gjøgnum eygleiðingar ella fakligar metingar.

Børn yvir 15 ár verða roknað sum partur í málinum við teimum rættindum, sum har tilhoyra.



KAP. 2

Skylda til samstarv

Øll, sum arbeiða við børnum og ungum hava skyldu at samstarva

Hetta fevnir um kommunur og landsmyndugleikar, m.a. dagstovnaøkið, skúlaverkið, heilsuverkið, inklusiv barna- og ungdómspsykiatri og Gigni, Almannaverk, barnavernd, námsfrøðilig- og sernámsfrøðilig ráðgeving.

Skyldan at samstarva er lógarbundin.

Endamálið er at tryggja, at børn og ung ikki detta niður millum skipanir.

Kommunur og land hava skyldu at hjálpa børnum og ungum, sum hava tørv á tí.

KAP. 3

Stigvís hjálparskipan

Trivnaðarráðgevi

Trivnaðarráðgevin er fyrsta stigið í stigvísu hjálparskipanini. Børn, ung, foreldur og verjar skulu hava atgongd til ein trivnaðarráðgeva at venda sær til, tá tørvur er á hjálp ella ráðgeving.

Trivnaðarráðgevin hevur ikki avgerðamyndugleika, men skal veita ráðgeving og stuðul til barnið ella tann unga og til heim og stovnar, serliga tá avbjóðingar eru byrjandi. Leikluturin fevnir eisini um at vera akkersfólk í sambandið millum viðkomandi partar.

Um tørvur er á breiðari fakligari meting ella meiri samansettari hjálp, verður málið flutt víðari í til netverkssamskipara.

Trivnaðarráðgevin er staðsettur, har børn og ung hava sín dagligdag, til dømis á dagstovnum og í skúlum. Leikluturin er grundfestur hjá tí myndugleika, sum hevur ábyrgd av tí stovni ella tí øki, har barnið hevur sín dagligdag, og skal hugsast inn í verandi skipanir.

KAP. 3

Stigvís hjálparskipan



Netverkssamskipari

Er málið meira samansett, ógreitt, ella krevur tað samstarv millum fleiri fakfólk, myndugleikar ella skipanir, verður málið flutt til ein netverkssamskipara.

Netverkssamskiparin hevur ikki avgerðarmyndugleika, men hevur heimild til og ábyrgd av at innkalla viðkomandi partar, tryggja, at ein felags tvørfaklig handlingsætlan verður gjørd, og at ætlanin verður fylgd og eftirmett.

Netverkssamskiparin hevur skyldu at boða barnaverndartænastuni frá, um málið krevur fyriskipanir sambært barnaverndarlógini.

Leikluturin er kommunalt grundfestur og skipaður innan eitt ávíst øki, til dømis eitt heilsuøki. Netverkssamskiparin virkar í samstarvi við aðrar tænastur kring barnið ella tann unga.

KAP. 3

Stigvís hjálparskipan

Barna- og familjueindin

Barna- og familjueindin hevur leiðandi ábyrgd fyri og eftirlit við skipanini og skal tryggja, at hjálpin virkar í praksis, at samstarvið millum tey, sum hjálpa, hongur saman, og at børn, ung og familjur teirra fáa tað, sum tey hava tørv á.

Barna- og familjueindin fylgir við málum, hevur eftirlit við samstarvsætlanum og kann krevja frágreiðingar frá viðkomandi myndugleikum. Eindin hevur eisini ein mennandi og ráðgevandi leiklut og skal viðvirka til at tryggja dygd, læring og betri arbeiðshættir í samlaðu skipanini.

Um myndugleikar ikki liva upp til sínar skyldur sambært lógini, kann eindin boða avvarðandi landsstýrisfólki frá.

KAP. 4

At lata persónupplýsingar víðari

Upplýsingar skulu fylgja barninum

Lógin ásetur, at neyðugar upplýsingar skulu fylgja barninum, tá mál verða flutt millum skipanir.

Hetta skal altíð gerast sambært reglum um persónsvernd og eftir prinsippinum um minst neyðugu upplýsingar.

Børn, ung og foreldur ella vaksin í foreldranna stað hava rætt til at vita, hvørjar upplýsingar verða latnar víðari og hví, uttan tá serlig atlit til barnsins trygd tala ímóti.

BARNALÓGIN SKAL TRYGGJA:

- barnsins besta
- rættin at verða hoyrd
- rættstundis og samanhangandi hjálp
- bindandi samstarv millum geirar og skipanir
- tryggleika, trivnað og heilsu
- vitanardeiling
- privatlív og persónsvernd
- javnrættindi fyri øll børn og ung

Barnalógin er lóg barnanna.
Hon skal føra við sær, at børn og ung verða hoyrd, fáa rættstundis og samanhangandi hjálp, og hava góðar karmar fyri trivnað og heilsu.